## ... um enskan fótbólt:

- Eftir mínum tykki er Premier League besta og mest spennandi kapping í heiminum. Eg fylgi trúliga við Manchester United. Men har kundi gingið heldur betri í skrivandi stund.




## ... um Oyggjaleikirnar:

- Oyggjaleikirnir hava stórt sæð verið ein góð avbjóðing fyri flogbóltslandsliðini, um vit hyggja burtur frá nøkrum av teimum innleiðandi dystunum. Tó er tað meiri spennandi fyri okkum at líka í C-EM, ímóti javnsterkum, og eitt sindur sterkari tjóðum. Hvør dystur er mennnandi og spennandi.

na



*- Hatta hugtakið: "Tab og vind med samme sind" er tað dummasta, eg havi hoyrt. Eg sigi akkurát, sum er: vinna kvinnurnar sína finalu, og tapa vit okkara, so fari eg ongan veg á veitslu, sigur flogbóltsspælarin Jón Nielsen, sum leygardagin spælir steypafinalu fyri SÍ*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Fakta

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Jón Nielsen |
| **Føddur:** | 20. mai 1980 |
| **Bústaður:** | Sørvágur |
| **Feløg:** (Flogbóltur:) | SÍ og Fleyr |
| **(Fótbóltur:)** | SÍ, AB og FS Vágar |